


**Kirkjugarður** *á Svínaryggi*

**Óli Jacobsen**
*olijacobsen@post.olivant.fo*



Trónd hjá Gustu:

# Javnaðartingmaður úr Kirkjubø

**Tað er eingin ivi um, at Gusta fekk nógvar úrmælingar sum eftirkomarar. Trónd var ein av fyrstu tingmonnunum hjá javnaðarflokkinum og var enntá úr Kirkjubø**

Í fyrsta partinum manglaðu tvey av børnunum hjá Gustu og Johannes. Tey vóru:

Marin Kristina, fødd í Kirkjubø í 1881, hon doyði longu árið eftir.

Sigrid Petrea Amalia (1886-1958), fødd í Havn. Hon var yngst, og tá hon er fødd, eru foreldrini flutt til Havnar.

Ein sonur Gustu var Jens. Hansara ætt eigur tríggjar steinar í gamla kirkjugarði. Elsta barn hjá teimum var Poul Olaf Emil Hansen f. 13.9.1902. Birgar Johannesen skrivar um hann: Olaf, sum hann varð kallaður, vaks upp á Hoyvíksvegnum í húsunum ovast í Krókabrekkuni. Eftir loknan barnaskúla fer hann til skips við føroyskari slupp. Í 1921 tekur hann skiparaprógv hjá Jens Paula í Dali. Hann var ógiftur.

Olaf andaðist 29. mars 1925 av eitran umborð á eini slupp, 22 ára gamal. Hann varð jarðaður 15. apríl. Hetta var merkiliga long tíð frá deyða til jarðarferð, hvør orsøkin kann vera til tess.



*Augusta, kallað Gusta. Enn eitt kent navn í Havn*



*Olaf hjá Jens hjá Gustu fekk eitt stutt lív*



*Trond hjá Gustu var ein úrmælingur*

Hin steinurin er yvir dóttir teirra Ragna f. 1909. Hon doyði ung í 1940.

Hon var gift við Niels Petur Johan Michael Olsen f. 16.5.1904, vanliga kallaður Niels í Skúvoy. Hann var skiparalærdur og førdi sluppina Seagul og trolarar sum Varðberg, Havborgina og Torkil Ønundarson. Tey vóru barnleys.

Niels giftist aftur við Jensinu Johannesen úr Hvalvík. Tey fingu børnini Regin. f. 1942, Sólfríð f. 1944, Anna f. 1946 og Tommy f. 1950.

### Trond hjá Gustu ein av fyrstu javnaðartingmonnum

Lítla Olga var dóttir Poul á Verkinum, son Jens.

Tá ið Trond Hansen (1881-1939) doyði, skrivaði N.A. Ejdesgaard m.a. í minningarorðum í Føroya Social Demokrati:

Vit, sum kendu Trond Hansen, vóru hugtikin av hansara mikla vilja, góðsku og trúskapi. Hann var íðin í øllum fyritøkum. Hann arbeiddi frá sólarris til sólsetur og fekk ótrúliga mikið frá hondum.

Honum kunnu føroyingar mest takka, at ansurin fyri dyrking av grøntsøkum nú er so mikil kring oyggjarnar. Tað vóru nærum altíð lagdir fyri hann spurningar um hetta evni, og aldri troyttist hann av at vegleiða teimum, sum á hann heittu. Sum stundirnar vóru til tað, kundi spyrjarin fáa frá fáum orðum til heilan fyrilestur. Og úrslitið er nú hareftir. Her skal bert nemast við eitt dømi: Fyri nøkrum árum hevði Tróndur í vídd mong tunnulendi av rabarbum, og nú eru hesi lendi margfalt minkað.

»Sig mær Tróndur, hví lærir tú fólk at dyrka tað, sum tú selur og skalt liva av? Tað kann væl ikki gagna tínum handli?«

»Á, jú,« svaraði hann, »tað er, sum ein tekur tað. Fyri tað fyrsta hava so fá í Føroyum ráð til at keypa grøntsakir. Øll hava gott av teimum. Og tí er tað betri, at fólk sjálvi dyrka tær heldur enn ongar at fáa. Fyri tað annað havi eg sjálvur gleði av at kunna læra onnur tað, sum eg dugi. Flest øll, sum hava biðið meg um ráð, vitja inn aftur, tá tey eru støðd her. Hugnaligt er tá at práta og hoyra, hvussu tað gongst teimum; tí altíð er tað okkurt, sum tey vilja duga meira... Og nú selji eg fyri mong teirra.«

Trond Hansen var handilsgartnari og seldi ein hóp av blómum úr egnum garði. Tað var so at siga einans vetrartíðir, hann seldi útlendsk blomstur.

Hann var heilsusterkur líka til nú, sjúkdómurin tók valdið kring um seinastu jól. Og vitið hevði hann til seinasta andadrátt.

Sínar fríløtur nýtti Tróndur úti í Guds ríku nátúr. Hann var mikil ítróttarmaður alla sína tíð. Haravleiðandi var hann fimur og sera kvikur. Soleiðis kann nevnast, at tá hann millum aðrar við báti kom at landi í Haldórsvík á leið til kirkjuvígslu í Tjørnuvík, stóð ungur maður úr hesi bygd fyri bátinum eftir medisini. Tróndur vildi fylgjast við honum til Tjørnuvíkar. Men óivað hevur hesum manni funnist Trónd nakað gamlan at vera, tí hann segði: »Eg eri i neyðsend og skal skunda mær.« Nokk um tað. Báðir byrjaðu at ganga og fylgdust alla leiðina. Og hetta er skjótasta gongd, sum enn hevur verið millum hesar bygdir.

### Brendi fyri teimum veiku

Trond Hansen var bleythjartaður sum fáur. Hann eymkaðist øll neyðstødd og sorgarbundin og hevði livandi samkenslu við teimum. Eingin svangur fór tómhentur frá honum hvørki á ein ella annan hátt. Hann var altíð við til at stuðla og stimbra onnur til verka.

Hann var trúgvur og tolin, góður og stillur, glaðlyntur og bjartsýntur. Hann verður saknaður av mongum. Og mong eru tey, sum hesar seinastu mánaðirnar hjartaliga hava biðið Drottin um at halda sína vælsignaða hond yvir honum.

Eitt bil (1917-1920) var hann álitismaður Havnar arbeiðara í býráðnum, og seinasta tingskeið var hann av socialistum valdur tingmaður fyri Havnina.



*OKKARA LÍTLA*
*OLGA A.S. HANSEN*
*F. 29-11 1931 D. 18-9 1934*
*SOV BARN SOV NÚ*
*Í HARRANS HOND*

*RAGNA OLSEN*
*FØDD HANSEN*
*F. 28-3 1909 D. 10-2 1940*

*TUNGT ER TEG AT SAKNA*
*MEN SÆLT ER UPPI*
*HAR AT VAKNA*
*HAR ALT ER LJÓST OG GOTT*
*HJÁ TÍ STÓRA LÆKNA*

*Triði steinurin hjá Olaf varð umrøddur í seinasta parti*

Hann var socialistur socialismunnar vegna. Orðini sum presturin Dahl (seinri kirkjuministari) segði í líktalu síni yvir hin mikla barna- og neyðstadravinin Peter Sabroe, hóska væl um Trónd: »Her standa vit um hesa kistu eins og børn, sum hava mist góðu mammu sína, uttan at skilja hvat tey hava mist.«

Hann elskaði heim sítt og var í orðsins fylsta týdningi faðir fyri børn síni. Hann var 57 ára gamal. Eftir hann er konan við 7 børnum, harav tey flestu tó eru vaksin.

### Marius endaði í Nólsoy

Sum umrøtt í fyrsta partinum fekk Johannes, maður Gustu, í 1872 ein son, Marius, við Siggu Sofíu Hansen. Her skal verða tikið við tað, sum Egon Hansen skrivar um abban:

Marius kom longu sum vøggubarn í fostur í Nólsoy hjá Hans Joensen, kongbónda í Búð og móður hansara Sigge Malene Hansdatter.

Góðu andaligu gávurnar hjá Marius og góð skúlagongd hjá Hanusi í Kongsstovu komu honum til góðar. Hann hevði gott hegni sum lækni. Skar svullir og tók tenn.

Marius giftist við Cathrine Sophie Thorsvig (1874-1854).

Tey fingu fimm børn. Ein sonur var Leif Hansen, pápi Egon, sum var ein kendur lærari í Nólsoy.

Seinni giftist Sigga Sofía út á Argjaboða. Maðurin var Ole Christian Iversen, fiskimaður, ættaður úr Húsavík. Tey fingu í 1882 dótrina Elsebeth Christina.

Hon giftist við Hans Jacob Joensen (Svíná Hans Jakku). Tey eru ættarfedrar til tey sum búgva og eita á Borg.

Í komandi parti um tvær vikur verður greitt frá Andreas Danielsen, son Dánjal hjá Andrass, ið bygdi Argir